# Umhvørvisstovan søkir eftir deildarleiðara til Skógrøkt

**Skógrøkt er ein deild á Umhvørvisstovuni, sum umsitur, røkir og mennir frílendi og plantutilfeingi, tillagað føroysku náttúruni og umhvørvinum.**

Umhvørvisstovan hevur týðandi fyrisitingarligan og vegleiðandi leiklut innan umhvørvisvernd, náttúrurøkt og lendisskipan her á landi, og stovnurin miðar eftir grønum, burðardyggum hugburði í samfelagsmenninigini.

## Uppgávurnar

Leiðarin skal, saman við starvsfólkunum, tryggja, at Skógrøktin er ein eyðsæddur viðspælari í grønu tilgongdini.

Gróðurstøðin í Hoydølum er arbeiðsstaður og verkstova, og viðarlundir kring landið eru partur av arbeiðsøkinum. Raðfest virksemi er ráðgeving og kunning um plantur, urtagarðsbrúk, gróðurseting og náttúrurøkt. Deildarleiðarin er skrivari hjá Skógfriðingarnevndini.

## Førleikakrøv

Vit ynskja at tú:

- hevur viðkomandi hægri útbúgving so sum fortskandidatur, landslagsarkitektur ella plantufrøðingur, men eisini fólk við øðrum líknandi førleikum og/ella royndum kunnu søkja
- hevur leiðsluroyndir
- dugir væl at samstarva við starvsfólk, áhugapartar og myndugleikar
- gongur á odda og hevur ein kveikjandi atburð
- við tínum leiðsluhátti leggur dent á, at starvsfólkini trívast og mennast

## Lønar- og setanartreytir

Starvið er fulltíðarstarv og verður flokkað sum deildarleiðari eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

## Umsókn

Umsókn saman við lívsrensli og viðkomandi prógvum skal sendast til Umhvørvisstovuna ella á us@us.fo **í seinasta lagi 15. juli 2017.** Viðmerk "Deildarleiðari á Skógrøktini" í umsóknina.

Um spurningar eru til starvið, ber til at venda sær til Petur Nielsen, stjóra, á tlf. 234310 ella við telduposti til peturn@us.fo Sí eisini www.us.fo.

umhvørvisstovan

Postboks 2048, 165 Argir, tel 342400, us@us.fo